Fylgiskjal 2

From:	Malan Johansen
To:	Fíggjarmálaráðið
Cc:	Tórir Michelsen
Subject:	SV: Til ummælis: uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin)
Date:	1. oktober 2025 17:17:11
Attachments:	image001.png

Viðmerkingar til uppskot um broytingar í Eftirlønarlógini.

Landsbankin hevur fingið *"Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslón um eftirløn (Eftirlønarlógin)"* til hoyringar.

Landsbankin vil viðmerkja §1, stk. 12 í lógini, sum snýr seg um §9, stk 1 í eftirlønarlógini:
"Útgjald av eftirlønarsamansparing við undantaki av stk. 5 og 9, byrjar fyrsta mánaðin eftir, at eftirlønarsamansparari nær fólkapensjónsaldri."

Landsbankin hevur tvær viðmerkingar til hesa broyting:

Fyrra atlitið er atlitið til mótrokning í fólkapensjónini.

Ætlanin er at broyta § 9 stk 1 í lógini, soleiðis at útgjald frá eftirlønini (tað sum persónur sjálvur sparir upp) byrjar tá persónur verður pensjónist. Tað vil siga, at tað fylgist ikki við útgjaldinum av fólkapensjónini, um persónur velur at útskjóta fólkpensjónina. Tað ber til í upp til 10 ár.

Eitt av høvuðsendamálinum við skipanini við eftirlønaruppsparing, er at minkað um trýstið á fíggjarlógini. Hevur persónur aðrar inntøkur enn fólkapensjónin, so verður tað mótroknað í fólkapensjónini.

Til dømis um ein persónur velur at arbeiða 5 ár eftir pensjónsaldur og í hesum tíðarskeiði fær útskotið fólkapensjónina, so vera 5 ár, har útgoldnað eftirlønin ikki kann mótroknast í fólkapensjónini. Ein stórur partur av eftirlønaruppsparingini verður sostatt útgoldin, uttan persónurin verður mótroknaður í fólkapensjónini.

Hetta kann tí gera fíggjarpolitiska haldførið verri.

Landsbankin heldur, at broytingin stríðir ímóti endamálinum við pensjónsnýskipanini, nevniliga at øll skulu hava eina eftirlønarinntøku, sum kann mótroknast í fólkapensjónini. Hetta so lætt verður um trýstið á fíggjarlógina, so landskassin kann megna at taka sær veksandi heilsu- og røktarútreiðslunum í framtíðini.

Landsbankin mælir tí til at halda fast við, at eftirlønin ikki skal gjaldast út fyrr enn persónurin byrjar at fáa fólkapensjónina útgoldnað.

Tað seinna er atlitið til inntøkuútjavning yvir liviár.

Tá ein persónur nær fólkapensjónsaldri hækkar inntøkan hjá einum persóni, sum heldur fram at arbeiða, sera nógv. Í fyrsta lagi fær persónurin 15% eftirlønarinngjaldið útgoldið sum løn. Í øðrum lagi fær persónurin útgoldið umleið 80.000 frá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum. Í triðja lagi lækkar skatturin hjá persóninum við umleið 5%, tí hann ikki longur skal gjalda arbeiðsmarknaðargjøld.

Tilsamans fær persónurin tí eina inntøkuhækking á umleið 40-50% alt eftir hvørjum inntøkubólki persónurin er í. Tað er tí ikki serliga skynsamt at tvinga borgaran at byrja

útgjald av eftirlønini, tí hann longu hevur nógv hægri løn at hann hevur havt áður.

Tað er tí sera sannlíkt at útgjald av eftirlønaruppsparingini kemur betri við, tá persónurin er blivin pensjónistur og hevur mist sína arbeiðsinntøku.

Landsbankin heldur, at broytingin stríðir ímóti høvuðsendamálinum við eftirlønaruppsparing, nevniliga at flyta pening frá arbeiðsárunum til pensjónsárini, tá inntøkan verður minni.

Landsbankin skal tí mæla til at halda fast við, at eftirlønin ikki skal gjaldast út fyrr enn persónurin byrjar at fáa fólkapensjónina útgoldnað.

Vinarliga / Kind regards

Malan Johansen | Stjóri/Managing Director | Landsbanki Føroya | Kvíggjartún 1, 165 Argir, Føroyar
+298 226 225 | malan@landsbankin.fo | www.landsbankin.fo